# Spurningar og svar í sambandi útboð av Talgildum Samleika

(spurnarumfar 2, tann 24. apríl 2017)

| Dato móttikið | Spurningur | Svar |
|---|---|---|
| 6.4.2017 | Smb. sáttmálanum ger Gjaldstovan licens-avtalur beinleiðis við undirveitarar, men høvuðsveitarin skal garantera fyri samlaðu veitingini. Hvussu hongur hetta saman? | Orsøkin til hetta er, at Gjaldstovan ynskir, at veitarin ráðgevur viðvíkjandi uppseting og val av licensum, og tí eisini garanterar fyri, at ráðgevingin er røtt. Hetta merkir í hesum sambandi, at veitarin svarar fyri, at valdu licensirnir eru nøktandi fyri tann tørv, sum Gjaldstovan hevur í.s.v. TS-loysnina, og ikki sjálvan funktionalitetin og møguligar manglar.<br><br>Garantiir av slíkum slag eru ikki óvanligir í okkara grannalondum. Í donsku K-sáttmálunum heftir veitarin útyvir at valdu licensir eru nøktandi, eisini fyri funktionalitetir og møguligir manglar sambært sáttmálanum, óansæð hvat er ávíst í licensavtalunum. |
| 24.4.2017 | Um vit gera avtalur um standardproduktir, so verður tað ein avtalað millum veitara og undirveitara. Nær yvirtekur Gjaldstovan? | Sum útgangsstøði yvirtekur Gjaldstovan licensavtalurnar sum liður í sjálvari yvirtøkuni av loysnini. |
| 6.4.2017 | Um man fer eftir einari SIM-baseraðari loysn, vil hetta so ella so krevja eitt samstarv við føroysku televeitararnar (FT og Vodafone). Ótti kann t.d. vera fyri, at FT hevur eina interessekonflikt her, annaðhvørt um FT er beinleiðis partur av eini tilboðsveiting ella sum eigari av KT fyritøku, ið letur inn tilboð | Tað er trupult hjá Gjaldstovuni at viðgera hendan trupulleika fyrr enn Gjaldstovan kennir valið av loysn og harvið leiklutin hjá televeitarunum. Gjaldstovan hevur verið í samband við FT og gjørt vart við møguliga trupulleikan. |
| 24.4.2017 | Hevur man nakra meining um eina loysn, sum loyvir authentikering í netbankanum uttan certifikat signering? | Talgildi Samleikin skal bjóða eina autentificeringsloysn og eina kvalificeraða signeringsloysn, og so er tað upp til tann einkulta tænastuveitaran, hvussu hvør einkult tænasta skal gera brúk av hesum. |
| 24.4.2017 | Kann man ímynda sær eina autentifikatiónsloys til TS, ið hevur ymisk trygdarstig (LoA)? | Vit hoyra gjarna um hetta, og eru opnir fyri møguleikanum, men hetta má undir ongum umstøðum koma ístaðin fyri kravið um at loysnin skal sum minimum kunna liva upp til trygdarstig "Substantial". |
| 24.4.2017 | Viðvíkjandi kravi OR8 í fylgiskjali 2b: Hvussu skal hetta krav skiljast? | Hetta er eitt "Oplysningskrav", har veitarin fyrst og fremst skal vátta, at veitarin hevur lisið og skilt |

| | | |
|---|---|---|
| | | kravið. Eisini krevst her eitt stutt útgreinandi svar, har veitarin grundgevur sambandið millum val av loysn og prís-strukturi. |
| 24.4.2017 | Viðvíkjandi kravi NFK27 – Tænastuveitarin skal kunna vísa í brúkslogginum (usage log), hvat fyri slag av transaktión verður framd? Er møguligt at útgreina, hvussu langt niður í smálutir hesir upplýsingar skulu fara? | Tað er enn ikki avgjørt, júst hvørjir upplýsingar talan er um. Veitarin skal gera tað møguligt at veita hesa tænastu.<br><br>Hvørja ferð ein tænastuveitari skal knýta seg uppí TS, vil hetta verða sæð sum eitt serstakt prosjekt, har tað m.a. skal avtalast, hvørjir upplýsingar skulu knýtast til transaktiónirnar.<br><br>Tankin við hesi funktión er, at tað skal vera møguligt hjá einum brúkara at síggja sín brúkslog og at tað sum verður víst, skal geva meining fyri brúkaran. |
| 24.4.2017 | Í fylgiskjali 2a "Needs statement" verður princippið "Mobile First" umtalað. Eisini skal veitarin hava í huga "open standards" og specifik dømir um "OpenID" og "Mobil Connect" verða nevnd. Skal hetta skiljast soleiðis, at hetta er nakað Gjaldstovan fyritrekkir? | Gjaldstovan heldur talan verða um ein áhugaverdan standard, og smb. Mobile Connect (https://developer.mobileconnect.io/authenticators) er møguligt at liva upp til nóg høgt LoA.<br><br>Gjaldstovan tekur tó ikki støðu til, um, um Mobile Connect er at fyritrekkja fram um aðrar opnar standardir fyri autentifikatión.<br><br>Legg til merkis at við Mobile Connect er tað vanliga MNO, sum er Identity Provider (IdP). Um Mobile Connect verður tilmælt av veitaranum, skal sostatt onkur góð loysn finnast fyri hetta, av tí at lagt verður upp til, at Gjaldstovan skal vera IdP. |
| 24.4.2017 | Hvussu skal mannagongdin vera í samband við authentikering av einum virki? Hvussu bootstrappar man hetta? Hvør møtir upp í samband við skráseting osv.? | Ætlanin er, at fyritøkur autentifikera upp ímóti komandi Virkisskránni. Fyritøkur og stovnar verða ikki skrásett við p-tali í dag í mun til nevnd, leiðslu og tekningarreglur v.m. Inntil ein autoritativ virkisskrá er tøk, má hetta loysast alternativt. |
| 24.4.2017 | Viðvíkjandi kravi NFK036 – Skal umtalaða avtalan millum hesar tænastuveitarar stýrast sentralt? | Nei, tað er ein avtala sum skal gerast millum tænastuveitarnar, sum TS ikki blandar seg í, men TS skal gera single-sign on funktiónina til taks (NB. bert krav, ikki minstakrav). |
| 24.4.2017 | Skal rótcertifikatið vera í Føroyum? | Rótcertifikatið til kvalificeraða signaturin skal liggja í Føroyum, meðan møgulig rótcertifikatir til Web trust kunnu arvast frá øðrum veitarum av góðkendum certifikatum. |
| 24.4.2017 | Verður samspæl millum TS og (rót)sertifikatið sum liggur i Heldini? | Nei. |
| 24.4.2017 | Hvør skal gera certifikat profilin? Hvør skal bestemma hvat stendur í? | Hetta er nakað Gjaldstovan væntandi skal standa fyri og skal gerast í tráð við ES lóggávu og ETSI standardir. |

| | | |
|---|---|---|
| 24.4.2017 | Tað verður nevnt at mandatir ikki siga nakað um hvørji rættindi mandatið gevur. Vil tað siga at tað bara er eitt antin ella mandat ímillum tveir persónar/felag og persón?<br>a. Tvs. eg kann ikki geva roknskaparfólkinum mandat at "orna" MVG-viðurskifti við TAKS, men einki annað? | Ja, tað er rætt skilt, at hetta sum útgangsstøði er eitt antin ella mandat. Tænastuveitarin kann so decentralt gera evt. brúkarastýring til hvørt mandat. |
| 24.4.2017 | Ein málsetningur við Talgildu Føroyar verkætlanini er, at data bara skal skrásetast eitt stað. Um hetta skal fungera í praksis, so skal FOLK gerast annarleiðis. Hvussu er hetta tonkt t.d. í samsvar við krav FK015. | Tað eru nýggjar vevtænastur á veg gjøgnum Heldina, eisini viðvíkjandi FOLK. Júst hvussu allar mannagongdir skulu verða - og t.d hvørjar dátur skulu brúkast í samband við útflýggjan, hvat skal liggja í loysnini, hvørjar skráir skulu kallast upp til og hvør skal kunna gera broytingar - er ikki heilt greitt enn, men skal avklárast í.s.v. agilu tilgongdina. |
| 24.4.2017 | Viðvíkjandi kravi FK29 – Hvat er tað sum man ynskir at lýsa her? | Bankarnir hava í dag møguleika at síggja tilsvarandi upplýsingar í NemID loysnini. Tankin við hesi funktión er, at tænastuveitarin hevur eitt útgangspunkt, hvar man skal byrja um t.d. onkur feilur ella misnýtsla er farin fram.<br>Tað er ein mangul, at kravið ikki endar við teksti um, at kravið skal útdýpast sum partur av agilu processini. |
| 24.4.2017 | Viðvíkjandi kravi FK 46 – Merkir hetta at brúkarin hevur tveir identitetir? | Sum Gjaldstovan sær tað, kann hetta loysast uppá ymiskar mátar – annaðhvørt um talan er um ein og sama identitet (loysast við mandati/attributtum) ella um talan er um tveir serstakar identitetir. Tað kunnu verða formligar orsøkir til at avskildra borgara- og starvsfólkaidentitetirnar um borgarin og/ella arbeiðsgevarin ynskja hetta. |
| 24.4.2017 | Nets hevur eina størri deild við fólki, sum bara ansa eftir at identitetirnir ikki verða misbrúktir. Vit duga ikki at síggja nakran funktionalitet til hetta í TS. Hava tit gjørt tykkum tankar um tað? | Hetta er eitt øki, sum ikki er fevnt av verandi útboðstilfari, og tískil er veitarin ikki pliktaður at svara hesum sum partur av tilboðnum. Evni er tó viðkomandi og Gjaldstovan hoyrir fegin sjónarmiðini hjá veitaranum hesum viðvíkjandi. Hetta er nakað, Gjaldstovan kemur at viðgera nærri í nærmastu framtíð (partur av aðrari deil-verkætlan). |
| 24.4.2017 | Í samband við enrollment processir: Um TS verður ein SIM-baserað loysn, má RA/umsitarin t.d. fáa atgongd til at broyta okkurt í skipanunum hjá FT og Vodafone. Hevur FT sum er nakrar tænastur til hetta endamál? | FT svaraði uppá hendan spurning – um tað eru tey røttu sim-kortini, so burdi tað ikki verði neyðugt, at televeitarin skal vera við. Um onkur t.d. hevur skeivt sim-kort ella okkurt nummar sum skal broytast, so er tað onkur web-tænasta sum skal veita hetta. Hetta |

| | | |
|---|---|---|
| | | sær FT ikki sum nakran størri trupulleika, og nakað sum lættliga kann loysast. |